Fjølbroytt summarframsýning

Fríggjakvøldið lat Summarframsýningin 2003 í Norðurlandahúsinum upp, og sjey føroysk listafólk fara komandi vikurnar at sýna fram fjølbroytt listaverk. Heitið í ár er »Mótsetningar og breidd«

FRAMSÝNING
Stefan í Skorini

– Vit eru sanniliga glað fyri, at verkfallið nú er av , so at vit kunnu hava summarframsýningina og mentanarnátt sum ætlað, sigur Helga Hjørvar, stjóri í Norðurlandahúsinum.

Sjey føroysk myndlistafólk eru við á framsýningini, sum hongur uppi til 31. juli. Alt húsið er tikið í nýtslu til hesa framsýningina, so at listaverkini passa inn í tað umhvørvið, har tey hanga ella standa.

Listafólkini á framsýningini eru: Zacharias Heinesen, Hansina Iversen, Rannvá Kunoy, Astri Luihn, Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen, Torbjørn Olsen og Guðrið Poulsen.

Astri Luihn (vinstrumegin) og Guðrið Poulsen sita her við eitt av listaverkunum, sum verða at síggja í Norðurlandahúsinum fram til 30. juli

Mynd: Jens Kr. Vang

Fjølbroytt verk

– Vit hava eina sera spennandi framsýning í ár, og vit hava tikið fleiri partar av húsinum í nýtslu. Hetta tiltakið eydnaðist sera væl í fjor, og tí halda vit fast við henda leistin. sigur Helga Hjørvar.

– Heitið á hesi summarframsýningini gevur eitt greitt tekin um, at framsýnarar, sum sjálvir hava skipað framsýningina og sostatt eisini mótsetningarnar, hava viljað lagt dent á tað samansetta, stendur at lesa í bóklinginum, sum er skrivaður um listafólkini og framsýningina.

Listafólkini spenna eisini yvir fleiri mansaldrar, har elsti luttakarin Zacharias Heinesen er føddur í 1936, og yngst er Rannvá Kunoy, sum er fødd í 1975.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður við mentamálum, letur framsýningina upp klokkan 22, og klokkan 23 fer íslendska kórið Sunnan Heiða at syngja.

Annars hevði Norðurlandahúsið opið leingi fríggjakvøldið, so at fólk kundu fáa høvi til at njóta myndlistina, sum varð sýnd fram.

Íslendsk íkast

Íslendska kórið Sunnan Heiða, sum telur 36 sangarar, var eisini við á mentanarnáttini. Við sær hevði kórið tann kenda operasangaran Ólavur Kjartan Sigurðarsson og ein klaverleikara.

Kórið fer eisini at hava eina konsert í mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið klokkan 20.

Maskinmeistarafelagið vil ikki hava semingsmann

– Vit fara ikki at útnevna ein semingsmann, tí vit meta okkum hava ein sáttmála og síggja ikki nakra ósemju millum okkum og SEV, sigur Jógvan Nybo, formaður í Maskinmeistarafelagnum

ARBEIÐSTRÆTA
Stefan í Skorini

Hósdagin sendi stýrið í SEV eitt skriv til Maskinmeistarafelagið, har stýrið heitti á felagið um at útnevna ein semingsmann, so at ein loysn kann finnast á knútinum, sum er íkomin eftir at Karsten Hansen ikki vildi góðkenna sáttmálan millum partarnar.

Hetta vil Maskinmeistarafelagið tó ikki hoyra talan um. Felagið fer at svara skrivinum frá SEV og boða frá, at tað ikki fer at útnevna ein semingsmann, tí felagið hevur skrivað undir ein sáttmála.

Maskinmeistarafelagið heldur sostatt fast við, at sáttmálin, sum varð undirskrivaður tann 28. mars, framvegis er galdandi, hóast hvørki Fíggjarmálaráðið ella SEV vilja kennast við hendan sáttmálan.

Men er tað ikki heldur løgið, at Maskinmeistarafelagið heldur fast við ein sáttmála, sum Fíggjarmálaráðið ikki vil góðkenna, og sum SEV ikki kann halda seg til?

– Nei tað halda vit ikki er løgið. Vit hava undirskrivað ein sáttmála, sum okkara limir hava fingið løn eftir, so har er í veruleikanum eingin trupulleiki, sigur Jógvan Nybo, formaður í felagnum.

SEV vísir til paragraf 21, stk. 1 í tí nýggja sáttmálanum. Henda greinin er tó eisini við í tí gamla sáttmálanum. Har stendur at um sáttmálin er uppsagdur ella semja ikki fæst í lag partanna millum, hevur hvør av pørtunum rætt til at fáa tingingar framdar við uppílegging av semingsmanni. Um semja ikki fæst um semingsmann verður hann útnevndur av sorinskrivaranum.

SEV kann sostatt vænta sær at fáa noktandi svar frá Maskinmeistarafelagnum, og fastlæsta støðan er sostatt ikki nærri eini loysn nú enn áður.

RAGNAR MAGNUSSEN
Timbur- & snikkaraarbeiði
t.d.
Umvælingar
Skifting av tøkum
Húsavørðsarbeiði
tel. 51 89 02

2 starvsfólk
til Mylnuna
Seki verður eftir starvsfólki til 2 fullfíggjaðarstarv við skiftandi vaktum. Starvini skulu setast skjótast tilber.
Nærri upplýsingar fæst frá Levi Jacobsen á telefon 225444.
Skriviligt umsókn skal sendast til Mylnuna, Postboks 1059, 110 Tórshavn.
mylnan
Mylnan • Postboks 1059 • 110 Tórshavn

Marjun Sigurðsdóttir, forkvinna í MBF:

Mál verða rokkin við hesum árinum

Í sambandi við, at 2003 er lýst at verða ár teirra brekaðu, er ljóskastarin av álvara settur á tey, ið bera brek og teirra viðurskifti. MBF ger eitt miðvíst arbeiði fyri at fáa viðurskiftini lýst, og tey lata væl at undirtøkuni

ÁR TEIRRA BREKAÐU
Solby A. Eliasen

Hóast stór framstig eru hend á økinum seinastu árini, so eru framvegis viðurskifti her á landi, sum avmarka tey, ið bera brek, frá at kunna virka so vanligt, sum til ber. Verri enn so allir almennir bygningar eru atkomuligir og onnur viðurskifti eru somuleiðis ikki betrað.

Og tað hevur Marjun Sigurðsdóttir, forkvinna í MBF, góðar vónir um at fáa betra. MBF arbeiðir miðvíst við at varpa ljós á viðurskiftini hjá teimum, sum bera brek, og tað letur til at undirtøkan er góð.

Millum annað er ein herferð á skránni hetta summarið, har ferðast verður kring landið við ymsum framsýningum og øðrum, sum tey, sum bera brek, skipa fyri.

Fyrsta stig av herferðin var á norðoyastevnu, sum var um mánaðarskifti mai – juni. Tá var millum annað ein framsýning, sum teir vardu verkstaðirnir í Klaksvík, Runavík og Havn stóðu fyri. Har kundi ein síggja tekningar og annað, sum tey í dagliga starvast á verkstøðunum hava gjørt. Ein av lyklapersónunum til hesa framsýningina, Símun Poulsen úr Klaksvík, hevði ein heilan vegg fyri seg sjálvan við sínum meistarligu tekningum. Tað er somuleiðis ein tekning frá honum, sum er á plakatini fyri ár teirra brekaðu.

So bar eisini til at royna ymiskt tól á hesi framsýningini, sum lýsa viðurskiftini summi av teimum, sum bera brek dagliga liva undir. Til dømis var eitt tól, sum vísti, hvussu tað er at hava tinitus. So var eisini ein fløga við teknmáli fyri børn, og MBF hevði ein krók, har ein kundi fáa upplýsningar av ymsum slagi.

M´s Blues Band var eisini við á norðoyastevnu, og tey hildu eina góða konsert í sambandi við setanina av stevnuni. Tað var sera stuttiligt at síggja og hoyra tey. Tey spjaddu lívsgleði, tað er púra vist.

Men hetta var sum sagt bert byrjanin til tað heila. MBF hevur ætlanir um at ferðast kring landið við hesum. At tað bleiv júst á norðoyastevnu, var tí, at ein stevna verður mett at verða eitt gott høvi at varpa ljós á hesi viðurskiftini. Tað sást somuleiðis aftur í røðarunum á norðoyastevnu. Marjun helt sjálv røðu til midnáttarsamkomuna og forkvinnan í Giktafelag Føroya, Laila Solmunde helt røðuna til fólkafundin. Og harafturat varð Tóra við Keldu biðin um at handa steyp og heiðurmerki til kappróðrarfólkini.

Og Marjun væntar, at tey somuleiðis verða við á Jóansøku og á Varmakeldu. Hvussu verður við Ólavsøkuni, veit hon ikki at siga nú.

– Árið í ár gevur øllum føroyingum ein møguleika, hvørið tekur av, tað skal verða tykkara val, segði Laila Solmunde, forkvinna í Giktafelag Føroya millum annað í røðu síni á norðoyastevnu

Mynd: Norðlýsið

Náa onkur mál

Tær báðar Marjun Sigurðsdóttir og Laila Solmunde hildu sum sagt ávíkavist røðurnar á midnátt og til fólkafundin á norðoyastevnu. Báðar vístu tær á, at nógv er hent á økinum, men enn er langt eftir á mál.

– Atkoma er so nógv, men eg vænti, at hetta sum nú hendir og er hent, fer at spreiða seg sum ringar í vatninum, sigur Marjun Sigurðsdóttir.

Hon vísir á, at eitt nú er tann teknmálstulkaða Dagur og Vika eitt sera stórt framstig á leiðini. Men samstundis harmast hon um, at pengarnir til hetta eru við at ganga undan, og alt týðir upp á, at hetta verður burtur aftaná 1. juli. Men tað ætlar hon ikki skal henda. Hon sigur, at tey mugu royna at arbeiða fyri at útvega neyðuga peningin og so finna eina varðandi loysn.

– Hugsa tær, um tú ongantíð hevði hoyrt nøkur tíðindini – hvørki í útvarpi ella sjónvarpi. Øll tey, sum eru deyv, fingu fyri fyrstu ferð eina teknmálstulkaða Dag og Viku í oktobur, og tey eru so fegin um hana, sigur Marjun, sum somuleiðis fegnast um, at feløg og stovnar arbeiða fyri at gera teirra bygningar meiri atkomuligar. Hon nevnir mentunarhúsið í Fuglafirði og nýggja bygningin hjá Føroya Sparikassa yvir við Strond í Havn, sum hevur fingið eina viðurkenning frá MBF.

Eisini er fartelefonin eitt sera hent amboð hjá deyvum, sum jú hava møguleika til at senda sms boð, og harvið fáa tey samskift við øll uttan stórvegis trupulleikar.

MBF arbeiðir við at fyrireika eina ráðstevnu, sum skal verða í Norðurlandahúsinum seinni í ár. Har er ætlanin at Bengt Lindquist, sum er spesialrapportørur í ST skal halda fyrilestur. Tær fyrireikingarnar eru ikki komnar á mál enn, men ætlanin er , at ráðstevnan skal bera brá av bæði føroyskum og útlendskum gestum og tilfari annars.

Marjun Sigurðsdóttir helt sína røðu undir heitinum: At hava heimarætt. – Og tað er eitt av endamálunum við ári teirra brekaðu. At øll skulu kunna kenna seg heima á jøvnum føti við øll onnur, segði hon millum annað í Vágstúni á norðoyastevnu

Mynd: Norðlýsið

Maria Olsen úr Klaksvík arbeiðir miðvíst við at menna tað roykfría umhvørvið. Hon skipar fyri roykistopp skeiði, sum byrjar í Uppistovu mikukvøldið 11. juni klokkan 21

Útlærdur ikki-roykjari

Maria Olsen úr Klaksvík skipar fyri roykistopp skeiðum. Tað eru heilt einfalt skeið, har tú lærir at leggja sigarettirnar á hillina. Hon hevur havt eitt skeið, og tað næsta byrjar komandi mikukvøld

ROYKISTOPP
Solby A. Eliasen

Klaksvík: Eitt tílíkt skeið varar í seks vikur. Luttakararnir hittast eitt kvøld um vikuna í hálvanannan til tveir tímar. Tvey tey fyrstu kvøldini verða nýtt til at fyrireika seg upp á at leggja av. Tað vil siga, at tey áseta dagfestingina fyri, nær tey skulu gevast. Síðani verður arbeitt við at fyrireika seg sum best til tað. Tann triði fundurin verður so hildin einar tveir til tríggjar dagar eftir ásettu dagfestingina. Og teir fundirnir, ið eftir eru, verða so nýttir til at eggja einum til at halda sær.

– Vit arbeiða við at broyta hugburðin. Heldur enn at fokusera upp á trongdina at roykja, so flyta vit heldur ljóskastarin yvir á, hvussu gott tað er ikki at roykja, greiðir Maria frá.

Hon sigur, at tað ber til at læra seg at leggja av at roykja líka so væl, sum ein kann læra at spæla upp á eitt ljóðføri ella eitt hvørt annað. Tað verður tikið í stigum, og ein gerst betur og betur til tað, sum tíðin líður.

Ein annar fyrimunur við at fara á skeið at læra seg heldur enn at royna einsamallur er, at tá kemur ein í samband við fólk, sum eru í sama báti.

– Tú hittir fólk, sum vilja tað sama, sum tú, og tað skuldi lætt eitt sindur um, heldur Maria.

Men nær er ein so útlærdur ikki-roykjari?

Tað heldur Maria er torført at siga, men hon sigur tó, at tá ein megnar at vera yvirmaður hjá sigarettini og ikki umvent, tá er ein komin væl áleiðis.

Maria Olsen hevur verið sokallaður selskapsroykjari sjálv, men tað eru nú hálvttriðja ár síðani, at hon sjálv roykti seinast. Hon plagdi bert at roykja til serlig høvi, men hon gavst, tí hon var bangin fyri, at hon fór at gerast roykjari. Til dagligt arbeiðir Maria á Norðoya Apotek, og hon sigur, at hon dagliga sær roykjarar inni har, sum stríðast við at leggja av. Tað og so hennara áhugi fyri at menna tað roykfría umhvørvið gjørdu sítt til, at hon í 2001 fór niður at taka hetta skeiðið.

– Her var ongin vegleiðari í roykistoppi í Klaksvík frammanundan, og tað spældi somuleiðis inn, sigur hon. Maria eru leiðari hjá byrkjubeinunum í Skótaliðinum Nólsoyar Páls, og har arbeiðir hon eisini fyribyrgjandi móti royking. Í desembur 2002 gjørdi hon eina avtalu við tey, at um tey ikki royktu í eitt heilt ár, so fáa tey eitt merki á skótabúnan afturfyri.

– Um tað kann verða við til at halda teimum frá at byrja, so er tað bara gott, sigur Maria Olsen.

Tað er pláss fyri 15 skeiðsluttakarum hvørja ferð og áhugin er stórur millum fólk. Til seinasta skeiðið var fult teknað, og luttakararnir vóru í aldrinum 16 til 51, so ikki kann annað sigast enn, at tað er fyri allar aldursbólkar.

Fyrsta kvøldið verða tær 1.050 krónurnar, sum skeiðið kostar rindaðar, og samstundis verður ein tagnarskylda avtalað, so at fólk ikki fara út um teir fýra veggirnar og tosa um skeiðið.

Hetta skeiðið byrjar mikukvøldið 11. juni kl. 21 í Uppistovu, sum er húsið, har gulu skótarnir í Klaksvík húsast. Tekning fer fram á tlf 282171 millum klokkan 18 og 22.